# *Oddagrein*

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# HÁLVA MILLIÓN FYRI SEMING

»Tað viðkermur ikki øðrum enn pørtunum, sum samráðast«.

Tað var stutta svarið frá Terja Sigurðsson, tá Sosialurin bað hann um eina viðmerking, nú blaðið kann avdúka, at hann og Hákun Steingrímsson fingu 218.250 krónur *í part* fyri at vera semingsmenn í sáttmálastríðnum á almenna arbeiðsmarknaðinum í november. Hendan klekkiliga upphædd var løn fyri arbeiði í tvær vikur!

Tað undrar stórliga, at fimm fakfeløg, sum umboða ófaklærdar verkakvinnur, lærarar, pedagogar, sjúkrasystrar og fólk í almennum starvi finna seg í slíkum okursprísum.

Tað undrar eisini stórliga, at Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið finna seg í tí. Eru virkuliga ongar avmarkingar, sum kunnu forða slíkari mergsúgving av almennum pengum og dýrt goldnum limagjaldi hjá fakfelagslimum?

Sosialurin hevur fingið innlit í skjøl úr Fíggjarmálaráðnum, sum vísa, at semingsmenninir hava sent ráðnum hvør sína rokning upp á 109.125 krónur. Týðuliga stendur tilskilað, at hetta er helmingurin av kostnaðinum, og at fakfeløgini rinda hin helmingin. Av onkrari fyri okkum óskiljandi orsøk vildi einki av fakfeløgunum upplýsa okkum prísin, so annaðhvørt halda tey tað vera í finasta ordan, ella hava tey ringan smakk í munninum. Vónandi er orsøkin ikki, at samráðingarfólkini hjá fakfeløgunum duga eins væl og semingsmenninir at skriva rokningar...

Men álvaratos tit leiðandi fólk í fakfeløgunum. Hvussu ber tað til, at fakfeløg av øllum kunnu finna upp á at skapa slíkar vitleysar skipanir. Eitt er tað, at lærd fólk og fólk við serkunnleika á onkrum øki halda seg sjálv vera so nógv verd, at tey kunnu taka fleiri dagslønir um tíman, men tað skal valdast. Halda limirnir í Havnar Arbeiðskvinnufelag virkuliga, at tað er í ordan, at tveir menn skulu fáa meira enn eina ársløn hjá eini miðal arbeiðskvinnu fyri at samráðingarnar, sum teir í roynd og veru sjálvir gera av, hvussu langar tær eru. Er tað ikki onkur klokka, sum ringir hjá fakfeløgunum.



Í okkara verð er hetta slett ikki í ordan. Tann, sum hevur ásett ein tímapris fyri semingsmenn upp á 1.500 krónur um tíman - og givið teimum frítt slag at brúka so nógvar tímar, sum teimum lystir, hann kann ikki hava havt høvdið við sær. Og at fakfeløgini eisini góðtaka slíkt, tað styrkir bara fordómin, sum vit so mangan hoyra um fakfelagspamparar, sum hava mist sambandið við meiniga fakfelagslimin. Vit kunnu so bara fegnast um, at gjøgnumskygni í Fíggjarmálaráðnum er so gott, at slíkt kemur fram. Stóð tað til fakfeløgini, so varð hetta dult sum mansmorð – og tað er illgrunasamt...

**»» Við at tiga styrkja tey fordómar um fakfelagspamparar**

## 16 ára gamal umsat narkopengar

Ein tá bert 16 ára gamal drongur varð í Føroya Rætti í morgun dømdur 30 dagar treytað fongsul fyri at hava tikið ímóti og sent víðari niður til pápa sín í Danmark pengar, sum vístu seg at stava frá sølu av hassj.

Hendingin fór fram seinast í november mánaði í 2008, tá pápin setti seg í samband við sonin og bað hann um at hitta ein ávísan mann fyri at móttaka pengar, sum hesin skyldaði.

Talan var um tilsamans 76.400 krónur, sum drongurin umvegis egna konto og ein familjulim sendi niður til pápa sín.

Drongurin segði seg kortini ikki vita, at peningurin stavaði frá narkosølu, tó at hann segði seg hava ein illgruna um, at alt ikki ruggaði rætt.

Hann segði seg vita, at pápin var í fíggjarligum trupulleikum, og tí vildi hann hjálpa sum frægast.

Dómarin valdi at døma dreingin treytaðan dóm, tí hann metti tað vera linnandi umstøður, at hann var so ungur, tá hendingin fór fram, og at so long tíð er liðin.

Í sambandi við hetta málið og eini fimm onnur er serligur ákæri komin úr Danmark, tí føroysku ákærarnir eru ógegnigir. Hann kom til Føroya leygardagin og fer av landinum aftur í morgin.

## Ein gøta í Havn er til sølu

Gøtan Breiðablik í Eysturbýnum í Havn er í dag lýst til sølu. Tað er advokatvirkið Heygum & Petersen, sum vegna trotabúgv lýsir gøtuna til sølu.



Hóast eini 15 húski hava sín bústað á Breiðabliki í Havn, so er vegurin, sum hevur matrikkul nummar 1305r, kortini lýstur til sølu. Talan er um veg uttan fyri Lágargarð við Stoffalág - úti móti Boðaneshamri.

Tað vanliga er, at kommunan eigur almennu vegirnar. Men soleiðis er í øllum førum ikki í hesum føri, tí eitt smápartafelag, sum eitur SP/F Debes eigur hesa gøtuna. Trupulleikin er bara tann, at smápartafelagið er farið av knóranum og er í trotabúarviðgerð.

Advokatfelagið boðar í lýsingini frá, at vegateinurin Breiðablik er 2.059 fermetrar til víddar, at talan er um vanligan veg, sum ikki kann verða nýttur til annað endamál.



**»» Ósemja um nýtt atlas**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU 31



**»» Sexuta krúllan hjá Dan Klein**

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 33



## Til Íslands at renna

**Teir bestu ungu rennararnir í felagnum Treyti fara til Íslands fyrst at venja og síðan at luttaka í altjóða rennikapping**

Randi Jacobsen

Felagið Treysti fer fríggjadagin til Íslands við einum stórum ferðalagi.Tey verða 27 fólk, harav helvtin er børn.

Fyrst fara børnini at venja í eina viku og síðan at luttaka í altjóða kappingini Stórmóti ÍR í Lagardali vikuskiftið 22. og 23. januar.

Børnini, sum stóðu seg best í FM-rennikappingini fyri børn í summar, fingu fyrsta rætt at koma við. Tey vaksnu eru foreldur og onnur.

Børnini eru bara von at renna í Badmintonhøllini í Klaksvík. Tað verður munur á hjá teimum at skula royna seg í høllini í Reykjavík, sum hevur rennibreyt við sama undirlagi, ið rennibreytin í Havn hevur. Børnini eru millum 9 og 14 ára gomul.

Tað verður ein uppliving fyri ungu rennararnar at luttaka í hesi kappingini og síggja onnur royna longdarlop og onnur lop.

Endamálið við ferðini er eisini at geva børnum og foreldrum eina felags sosiala uppliving, og áðrenn farið verður heim aftur, verða útferðir gjørdar, sigur Guttorm Sørensen, ein av fyririkarunum

Av tí at rennararnir eru í skúlaaldri, er ætlanin at skipa undirvísing fyri teimum einar tveir tímar, meðan tey eru í Íslandi.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*